

Í Havn syrgdi HB fyri, at tað framvegis verða teir, sum skulu gera av, hvar gullið skal enda
Mynd: Finnur Justinussen



Tó at B68 framvegis hevur møguleikan, so tykist spurningurin um gullið nú vera eitt mál millum tey bæði havnarfeløgini, og B36 greiddi í so máta sína skyldu í Runavík
Mynd: Álvur Haraldsen

# FM heitið er komið í Gundadal

**Sunnudagin fara B36 og HB innanhýsis at gera av, um tað skal vera annað ella hitt havnarfelagið, sum skal vinna meistaraskapin**

16. UMFAR SAMANUM
*Jóannes Hansen*

Havnin hevði undanvind í illsligu fótbóltslíkindunum sunnudagin. HB vann avgjørda toppdystin ímóti B68 2–0, og við 2–1 sigri í Runavík syrgdi B36 fyri, at HB ikki longu eftir 16. umfarið meiri ella minni gjørdist meistari.

Undan næstsíðsta umfarinum hevur HB 35 stig, B36 hevur 34 stig, B68 hevur 32 stig, og NSÍ hevur 28 stig. Tað resta tvey umfør, og tískil er teoretiski møguleikin hjá NSÍ í ár at vinna fyrsta FM heitið nakrantíð heilt burtur.

Toftamenn hava framvegis møguleikan at vinna fyrsta FM heitið síðani í 1992, men í veruleikanum er hann burtur. Um B68 ikki fer heilt niður við nakkanum eftir leikliga vónbrotið og tapið í Gundadali, so mugu teir metast at hava møguleikar at vinna bæði á heimavølli ímóti GÍ og á útivølli í Vági. Men tað er á ongan hátt nóg mikið hjá B68 at fáa fult í sínum avbjóðingum. Møguleikin hjá teimum er eisini treytaður av, at HB og B36 spæla javnt, og at KÍ í síðsta umfarinum í Gundadali fær øll stigini frá HB. Tað er ikki so langt síðani, at VB fekk málleysan javnleik á territorinum hjá HB, men tað má metast heilt lítið ella rættari einki sannlíkt, at HB skal kiksað á heimavølli ímóti lítið sannførandi klaksvíkingunum, tá ið mest fer at standa á.

At HB ikki skal fáa meiri enn tvey stig afturat, um B68 møguleikin framvegis skal verða varðveittur kemst av, at nú er neyðugt hjá toftamonnum at fáa fleiri stig enn HB. Eftir 2–0 sigurin á heimavølli er HB betri í innanhýsis kappingini við B68.

Tað skal ein heilt góður vilji at finna aðrar møguleikar, enn at avgerðin um FM heitið fer at fella, tá ið grannarnir í Gundadali fara at bresta saman næsta sunnudag. B36 eigur heimadyst, og tí verða tað teir í árstalsfelagnum, sum fara at fáa áskoðarainntøkurnar.

Um tað fer at enda við javnleiki, so verður HB framvegis besta boðið upp á FM heitið. Hjá B36 er tað knívskorðið. Teir skulu vinna næsta sunnudag, um teir skulu verða meistarar. Um tað fer at eydnast hjá teimum at vinna, so verður FM møguleikin stórur, tí B36 skal í síðsta umfarinum til Gøtu. Tá kann støðan gerast heilt margháttlig, um B36 altso nú sunnudagin fer at fáa alt ímóti HB. Einasti møguleikin hjá GÍ enn eina ferð at sleppa upp í part í UEFA Cup er treytaður av, at B36 verður meistari. So sleppur GÍ upp í part í altjóða fótbólti, tí teir á Ólavsøku taptu steypafinaluna ímóti B36!

### Deyðbóltsstøðurnar

Ofta verður tikið til um eitt nú íslendskan og norskan fótbólt, at flestu málini verða skorað í sambandi við deyðbóltsstøður. Onkra ferðina áður hava vit víst á, at gongdin við lutfalsliga nógvum málum í sambandi við fríspark, hornaspark, innkast og sjálvandi brotsspark eisini hevur gjørt seg galdandi í føroyskum fótbólti. Gongdin í teimum báðum oddadystunum sunnudagin var gott dømi um hetta.

Í Gundadali vórðu bæði málini skorað eftir deyðbóltsstøður. Hitt fyrra eftir hornaspark, og hitt seinna eftir innkast.

Í Runavík vóru tvey av trimum málum skorað í sambandi við deyðbóltsstøður. Sjúrður Jacobsen úr NSÍ javnaði til 1–1 eftir hornasparksinnlegg, og Jens Kristian Hansen stútaði sigursmálið hjá B36 – eftir hornaspark.

Í Gundadali megnaði B68 ikki at spæla seg til upplagdar málmøguleikar. Teir tiltuskaðu sær fríspark úr nett somu støðu, sum Øssur Hansen hina ferðina skoraði ímóti Slovenia. Øll hildu ondini, meðan Øssur gjørdi seg til at skjóta sunnudagin, men so søplaði B68 møguleikan burtur í kombinatión, sum heilt kiksaði, uttan at Øssur slapp framat.

### Botnurin lætti sær á

Skála fekk sunnudagin trý stig á heimavølli ímóti VB. Men bjargingin undan aftasta plássinum er framvegis fimm stig burtur. Tað er hon, tí FS Vágar á heimavølli megnaði at vinna ímóti KÍ, sum eftir summarsteðgin bara hevur vunnið ímóti EB/Streymi og Skála, og sum má metast at hava havt eitt rættuliga kiksað kappingarár.

At FS Vágar fekk øll stigini ímóti KÍ, meðan VB tapti á Skála hevur við sær, at tað brennur ikki sørt undir VB. Næstniðasta plássið er bara tvey stig burtur. FS Vágar fær sunnudagin vitjan av Skála, meðan VB skal til Eiðis, og í síðsta umfarinum fer VB at fáa vitjan av B68, meðan FS Vágar skulu spæla í Runavík.

VB eigur útsetta avbjóðing á Vágseiði ímóti GÍ. Tann uppgerðin er ásett at verða nú mikukvøldið. Um VB fer at megna at fáa alt, so verður rættuliga torført hjá FS Vágum at sleppa burtur av næstaftasta plássinum. Um tað eydnast FS Vágum at fáa stig nú sunnudagin, so hevur tað við sær, at tað undan seinastu umfarinum verður greitt, at Skála næsta kappingarár verður í næstbestu deildini.

Eysturoyggin hevur longu tryggjað sær nýtt umboð í 1. deild. Leygardagin flutti ÍF, sum hevur átt mest støðuga liðið í næstbestu deildini, upp aftur í 1. deid, sum teir fluttu niður úr á seinasta leikdegnum í 1999.

Heldur ikki hesa ferð eydnaðist tað hjá B68 at varðveita næstbesta liðið í 2. deild í meiri enn eitt kappingarár. Royn er flutt upp í 2. deild, og í løtuni bendir nógv á, at tað verður næstbesta liðið hjá HB, sum skal spæla ímóti LÍF ella B71, sum leygardagin styrkti um sína støðu, um eitt pláss í næstbestu deildini.



### 1. deild menn

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 16 | 10 - 5 - 1 | 36 | 15 | 21 | 35 |
| 2 | B36 | 16 | 11 - 1 - 4 | 34 | 17 | 17 | 34 |
| 3 | B68 | 16 | 9 - 5 - 2 | 23 | 12 | 11 | 32 |
| 4 | NSÍ | 16 | 8 - 4 - 4 | 29 | 16 | 13 | 28 |
| 5 | KÍ | 16 | 7 - 2 - 7 | 25 | 25 | 0 | 23 |
| 6 | EB/Streymur | 16 | 5 - 6 - 5 | 29 | 33 | -4 | 21 |
| 7 | GÍ | 15 | 4 - 5 - 6 | 20 | 26 | -6 | 17 |
| 8 | VB | 15 | 3 - 4 - 8 | 15 | 25 | -10 | 13 |
| 9 | FS V | 16 | 3 - 2 -11 | 22 | 39 | -17 | 11 |
| 10 | Skála | 16 | 2 - 0 -14 | 9 | 34 | -25 | 6 |

### 2. deild menn

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 16 | 12 - 3 - 1 | 36 | 13 | 23 | 39 |
| 2 | Sumba | 16 | 9 - 4 - 3 | 32 | 13 | 19 | 31 |
| 3 | TB | 15 | 9 - 2 - 4 | 45 | 22 | 23 | 29 |
| 4 | AB | 16 | 6 - 5 - 5 | 27 | 21 | 6 | 23 |
| 5 | KÍ | 16 | 7 - 1 - 8 | 31 | 47 | -16 | 22 |
| 6 | B36 | 16 | 6 - 3 - 7 | 27 | 21 | 6 | 21 |
| 7 | VB | 15 | 6 - 2 - 7 | 28 | 19 | 9 | 20 |
| 8 | B71 | 16 | 5 - 2 - 9 | 24 | 22 | 2 | 17 |
| 9 | LÍF | 16 | 5 - 1 -10 | 21 | 44 | -23 | 16 |
| 10 | B68 | 16 | 2 - 1 -13 | 9 | 58 | -49 | 7 |

### Máltindarnir

1. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 13 |
| John Petersen | B36 | 9 |
| Heðin á Lakjuni | B36 | 8 |
| Sorin Anghel | EB/S | 8 |
| Andrew av Fløtum | HB | 8 |
| Jákup á Borg | B36 | 7 |
| Rógvi Jacobsen | HB | 7 |
| Helgi L. Petersen | NSÍ | 7 |
| Clayton Soares | FSV | 6 |
| Sonni L. Petersen | NSÍ | 6 |
| Birgir Jørgensen | VB | 6 |
| Milan Kulic | VB | 6 |
| Súni Fríði Johannesen | B68 | 5 |
| Birgir Joensen | FSV | 5 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 5 |
| Súni Olsen | GÍ | 5 |
| Tór-Ingar Akselsen | HB | 5 |
| John Heri Dam | B68 | 4 |
| Egil á Bø | EB/S | 4 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 4 |
| Ronnie Samuelsen | EB/S | 4 |
| Kim Poulsen | FSV | 4 |
| Símun Samuelsen | GÍ | 4 |
| Karsten From | HB | 4 |
| Rúni Nolsøe | HB | 4 |

2. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| Kaj Roest | TB | 10 |
| Áki Mørk | B36 | 9 |
| Eirikur Joensen | Sumba | 9 |
| Dan Mortensen | TB | 9 |
| Hanus Eliasen | ÍF | 8 |
| Eyðun Samuelsen | AB | 7 |
| Høgni Zachariasen | ÍF | 7 |
| Allan Michelsen | TB | 7 |
| Pætur Dam Jacobsen | AB | 6 |
| Ken Bærendsen | ÍF | 6 |
| Helmar Lassen | KÍ | 6 |
| Óli Johannesen | TB | 6 |
| Sigmundur Mikkelsen | VB | 6 |
| Jónsvein Thomsen | B71 | 5 |
| Tummas Pauli Olsen | B71 | 5 |
| Eyðolvur Petersen | ÍF | 5 |
| Erling Fles | KÍ | 5 |
| Olgar Danielsen | KÍ | 5 |
| Rasmus Nolsøe | TB | 5 |
| Jón Pauli Olsen | VB | 5 |
| Dánjal Petur Johansen | B36 | 4 |
| Axel Højgaard | B68 | 4 |
| Símun Hansen | B71 | 4 |
| Kaj Eli Poulsen | LÍF | 4 |
| Magnus Dalbø | LÍF | 4 |
| René Thomsen | Sumba | 4 |

# Tveir norðurlandameistarar

**Danin Curt Hansen og sviin Evgenij Agrest endaðu fremstir í NM, sum bleiv telvað í Århus, meðan Flóvin Tór Næs bleiv aftastur í sterku kappingini**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Í frálíkum umstøðum í Århus fingu norðurlendskir telvarar høvi at kýta seg ímóti hvøjum øðrum. Ein teirra varð Flóvin, sum einsamallur umboðaði Føroyar. Hini norðurlondini høvdu tvey umboð hvør, uttan Danmark sum hevði trý umboð, orsakað av tí eina umboðnum úr Føroyum.

### Leikliga gongdin

Sviin Jonny Hector legði bestur út við sigrum í trimum teimum fyrstu umførunum, men fall síðani spakuliga burturfrá oddinum. Íslendarin Helgi Olafsson og Curt Hansen vórðu fremstir eftir seks umførum, og meðan Helgi eins og Hector dragnaði eitt petti, helt Curt fram við góða spælinum.

Teir einastu ið megnaðu at fylgja við dananum, vórðu Evgenij Agrest og Hannes Stefansson. Fyrrnevndi kláraði í tøkum tíma, við sigri á Flóvini í síðsta umfari, at fáa Curt aftur. Curt valdi við hvíta fólkinum at taka ein skjótan risikofrían javnleik í síðsta umfarinum ímóti Stefansson.

Flóvin skuldi eitt nú telva móti átta stórmeistarum. Ein spennandi avbjóðing, sum tó bleiv ein ov stór uppgáva hjá havnarmanninum. Hálvt stig av ellivu møguligum varð úrtøkan hjá Flóvini. Javnleik fekk Flóvin móti stórmeistaranum Lars Schandorff í fimta umfari.

Næsta kappingin hjá Flóvini verður í oktobur í Føroyum, tá hann saman við fýra øðrum føroyingum fara at royna seg í 2nd Klaksvík International. Meira um IM-kappingina verður at frætta í næstu viku.

Sí www.faroechess.com um nærri upplýsingar um kappingina.

### Endaliga støðan

| | | |
|---|---|---|
| GM C. Hansen (2618) | Danmark | 8,0/11 |
| GM Agrest (2605) | Svøríki | 8,0 |
| GM Stefansson (2560) | Ísland | 7,0 |
| GM Olafsson (2498) | Ísland | 6,0 |
| GM Hector (2538) | Svøríki | 6,0 |
| GM Gausel (2533) | Noreg | 5,5 |
| IM Palo, (2510) | Danmark | 5,5 |
| FM Lehtinen (2362) | Finnland | 5,0 |
| GM Kallio (2471) | Fin | 5,0 |
| GM Schandorff (2525) | Danmark | 5,0 |
| IM Lie (2440) | Noreg | 4,5 |
| FM Flóvin Tór Næs (2330) | Føroyar | 0,5 |

## Talvið hesa vikuna

Dúgliga hevur verið telvað um russiska meistaraskapin. Yvir 50 stórmeistarar, harav nógvir úr topp 30 í heiminum. Kasparov og Kramnik luttóku tó ikki. Eisini í Russlandi fingu vit tveir vinnarar, nevnliga teir navnframu Peter Svidler, sum vann GM-kappingini í Norðurlandahúsinum í 1997, og Alexander Morozevich. Báðir fingu sjey stig av níggju møguligum. Svidler bleiv kosin vinnari vegna betri mótstøðustig, umframt at hann vann á Morozevich miðskeiðis í kappingini.

Talvið hesa vikuna er frá fyrsta umfari.

**Svidler,P (2723) - Sherbakov,R (2555)**
56th ch-RUS Krasnoyarsk RUS (1), 03.09.2003

**1.e4 c5 2.Rif3 Ric6 3.d4 cxd4 4.Rixd4 Rif6 5.Ric3 d6 6.Bg5 Bd7** (Sokallaði Rauzer varianturin í sisilionskum) **7.Fd2 Rc8 8.f4 Rixd4 9.Fxd4 Fa5 10.e5 dxe5 11.fxe5 e6 12.0—0—0** (Áhugaverd støða, sum er púra opin. Eisini er møguligt: 12.exf6 Fxg5 13.Rie4 sum eisini er gott fyri hvítan) **12...Bc6 13.Rib5! Bxb5 14.exf6 Bc6 15.h4 g6 16.Bc4** (Hvítur er væl betri útviklaður) 16...Fc5 17.Fd3 Ff5 18.Fb3 (Peikar óført móti e6. Svarta støðan tykist vónleys) **18...Rd8 19.Rdf1 Fg4**



**Støðan eftir 19...Fg4**

**20.Bxe6!** (Avgerandi) **fxe6 21.Rf4!** (neyðugt er at fylgja væl upp uppá góðar leikir) **Fe2 22.f7+ Kd7 23.Rd4+ Bd6 24.Rhd1 Bd5 25.Rxd5! exd5 26.Fxb7+** og svartur gavst vegna 26...Bc7 27.Rxd5+ Ke6 28.Fc6+ Bd6 29.Rxd6 Rxd6 30.Fe8+ **1—0**

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg

VARPIÐ
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2